UTTANRÍKIS- OG MENTAMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsveg 3
100 Tórshavn

Dagfesting: **6. mai 2020**
Tygara ref.**:**
Máltal.**: 19/00017-49**

Svar

upp á

fyrispurning nr. 75/2019 um háskúlar, settur landsstýrismanninum í uttanríkis- og mentamálum, Jenisi av Rana (at svara skrivliga eftir TS § 52 a).

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Hvat fer landsstýrismaðurin at gera fyri at tryggja, at virksemi á háskúlunum kring landið kann halda fram eftir støðuna við korona?

2. Fer landsstýrismaðurin at arbeiða fyri at fáa eina eykajáttan til háskúlavirksemi ella á annan hátt at hjálpa háskúlum fíggjarliga eftir, at virksemi er darvað av koronastøðuni?

3. Nær fara háskúlarnir at fáa kunning um, nær og hvussu tey kunnu byrja virksemi aftur.

Svar

Til 1: Landsstýrismaðurin ásannar, at støðan hjá háskúlunum hevur verið trupul í hesum koronatíðum, tí virksemi í skúlunum er avmarkað. Tað merkir, at skúlarnir ikki fáa tær inntøkur, sum skulu til at fíggja raksturin.

Leggjast kann afturat, at sama er galdandi fyri húsarhaldsskúlan.

Uttanríkis- og mentamálaráðið hevur fingið eina statusfrágreiðing frá Undirvísingarstýrinum, sum hevur um hendi samskiftið við háskúlarnar og húsarhaldsskúlan. Í frágreiðingini er mett, at háskúlarnir og húsarhaldsskúlin tilsamans hava ein inntøkumiss á áleið 700 tús. kr. orsakað av støðuni við korona.

Arbeitt verður við at veita skúlunum fíggjarligan stuðul, í tann mun tað verður mett neyðugt. Væntandi verður hetta sum partur av eini komandi eykajáttan, ið eisini fer at fevna um onnur ábyrgdarøki hjá landsstýrismanninum.

Til 2: Sum nevnt í svarinum til fyrsta spurning, verður arbeitt við at finna skúlunum fíggjarligan styrk.

UTTANRÍKIS- OG MENTAMÁLARÁÐIÐ

Leggjast kann afturat, at fyri at hjálpa uppá trupulleikan við likviditetinum hjá skúlunum, er avgerð tikin um at framskunda útgjaldið av einum parti av rakstrarstuðlinum, um tørvur er á tí. Mett verður annars leypandi um støðu skúlanna.

Til 3: Landsstýrismaðurin hevur fingið upplýst, at flestu skúlarnir eru farnir í gongd við at fyrireika, at virksemið so smátt kann byrja aftur. Men talan er um styttri skeið, og dentur verður lagdur á at skipa hetta á bestan hátt í mun til smittubreiðslu.

Tað nógva virksemi og tey stóru skeiðini hjá skúlunum fara tó neyvan í gongd aftur fyrr enn eftir summarfrítíðina, treytað av støðuni við korona.

Vinarliga

Jenis av Rana
landsstýrismaður

Tinghúsvegur 5-7 • Postrúm 3279 • FO-110 Tórshavn
☏ +298 30 65 00 • ummr@ummr.fo • www.ummr.fo